# Málið um lítla Petur í fólkatingið

**Eftir avdúkingarnar í Dags Dato sendingini hjá TV2 sunnukvøldið hava fleiri danskir politikarar gjørt vart við seg, og teir vilja hava málið lítla Petur reist í fólkatinginum**

LÍTLI PETUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Tað var trupult hjá teimum avvarðandi at siga lítla Peturi farvæl, tá ið hann bleiv sendur til Danmarkar. Nú verður málið tikið upp av nýggjum, og familjan hjá Peturi vónar, at tað kann hava við sær, at Petur kemur heim aftur.*
*Mynd: Edvard Joensen*

Í sendingini hjá TV2 kom fram, at tað eru greiðar ábendingar um, at pápi Petur hevur gjørt seg inn á børnini, og at ein sálarfrøðingur í Føroyum hevur nevnt hetta í frágreiðing sínari eftir eina kanning av Peturi. Hóast hetta eigur at hava við sær, at ein kanning verður sett í gongd, sum kann gera av, um børnini eru misbrúkt, so lótu hvørki Tórshavnar Kommuna ella Karup kommuna, har pápi Petur býr, við seg koma.



*Danski almannaráðharrin, Eva Kjer Hansen, segði við TV2 sunnukvøldið, at hon fer at fáa málið um lítla Petur kannað av nýggjum fyri at staðfesta, um alt er farið rætt fram*
*Mynd: Jens Honoré*

At hvørki Tórshavnar kommuna ella Karup kommuna góvu tí ans, at sálarfrøðingurin hevði illgruna um misnýtslu av børnunum, kann fáa avleiðingar fyri umsitingina hjá teimum báðum kommunum.

## Vilja hava ráðharran at taka málið upp

Í tíðindasendingini hjá TV2 mánakvøldið søgdu tveir fólkatingslimir seg vilja hava danska almannamálaráðharran, Evu Kjer Hansen, at taka málið upp av nýggjum.

Fólkatingslimirnir, Christian H. Hansen úr Dansk Folkeparti og Line Barfod úr Enhedslisten, vóru á einum máli um, at tað kann ikki verða rætt, at ein drongur verður fluttur slakar 2.000 kilometrar á ein stovn, burtur frá báðum systrunum, ommu og abba og øðrum skyldfólki.

Christian H. Hansen er sjálvur úr Karup kommunu, og hann ivaðist ikki í, at tað nú var onkur í heimkommununi hjá sær, ið sat við ógvuliga reyðum oyrum, sum hann málbar seg.

Eisini Line Barfod segði seg verða skakkan av avdúkingunum í sendingini hjá TV2 sunnukvøldið, og hon helt, at danski almannaráðharrin sum skjótast eigur at taka málið upp av nýggjum Line Barfod segði, at hon fór at heita á Evu Kjer Hansen, so skjótt høvi býðst, at syrgja fyri, at málið um lítla Petur verður endurskoðað.

Sjálv segði Eva Kjer Hansen í beinleiðis samrøðu við Dags Dato sunnukvøldið eftir at hava sæð innslagið um lítla Petur, at hon helt talan verða um nýggjar upplýsingar, ið vóru komnar fram, og hon fór tí sum skjótast at heita á embætisfólk um at kanna málið av nýggjum og staðfesta, um alt er farið rætt fram í málsviðgerðini.

Vit royndu allan týsdagin fyri evstamark hjá blaðnum at fáa fatur bæði Christian H. Hansen, Line Barfod og Evu Kjer Hansen, men til fánýtis.

# Tobbi í rættinum í dag

**Seinnapartin í dag kemur málið um frádømingina av koyrikortinum hjá Torbjørn Jacobsen, løgtingsmanni, fyri í Føroya Rætti**

RÆTTARMÁL

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Klokkan 13.15 í dag skal Føroya Rættur at taka støðu til, um tað var í lagi, at koyrikortið hjá Torbjørn Jacobsen, løtingsmanni, bleiv tikið frá honum, eftir at tingmaðurin var tikin fyri rúsdrekkakoyring.

Tingmenn eru sum kunnugt vardir av politiskum órini, og tí halda Torbjørn Jacobsen og sakførari hansara, Bjørn á Heygum, at fútin ikki hevði heimild til at taka koyrikortið hjá løgtingsmanninum.

Torbjørn Jacobsen og sakførari hansara gjørdu tí av at leggja sak móti fútanum, og tað er hetta mál, ið kemur fyri í rættinum í dag.

Sambært Bjørn á Heygum er talan um eitt prinsipielt mál, ið ongantíð fyrr er roynt í donsku rættarskipanini, og tí er rættuliga stórur áhugi millum løgfrøðingar, hvat úrslitið verður.

Ein av royndastu sakførarunum her á landi, Jógvan Páll Lassen, segði í viðtalu við Sosialin í farnu viku, at hann ivaðist í, um fútin hevði heimild at taka koyrikortið frá Tobba.



*Í dag kemur málið um koyrikortið hjá Torbjørn Jacobsen, løtingsmanni, fyri í Føroya Rætti. Fútin tók koyrikortið frá løgtingsmanninum, hóast Tobbi er vardur av politiskum órini.*
*savnsmynd*